

*Símun Pauli úr Konoy var lærari hjá fleiri ættarliðum av gøtufólki*




*Universitetið í Gøtu, har Sofus Gregersen og eisini Óli Jacobsen hava gingið*

sum nú. Hetta var í oktober og nógvur kavi, so vit máttu ganga til Fuglafjarðar. Haðani fóru vit við motorbátinum Almu til Funnings. Men mamma saman við øðrum mammum, millum aðrar Hansina Husgaard, komu til Funnings leygardagin eftir at vera við til konfirmatiónina. Tær høvdu gingið til Funnnsfjarðar og vórðu førdar frá tí, sum kallast undir Lúku til Funnings.

Pápi og Tummas har Niðri komu við Almu sunnudagin, og vit fóru so avstað aftur við Almu.

Konfirmantarnir úr Gøtu vóru umframt meg sjálvan Andreas í Tøvuni, Marsanna hjá Johannes Jakku, sum seinni giftist við Jakku skómakara,. Erik í Køkinum, Petur Oluf hjá Tummas Hans og Elisabeth fastur, Nikal Thomsen, Hendrik hjá Zakaris Karl, Hans Huusgaard og Simona á Rætt. Eg eri einsamallur eftir av teimum øllum.

## Endiliga til skips

Eg fór ikki til skips fyrr enn í 1933, tá eg var 17 ár.Eg var so lítil av vøkstri, og mammu dámdi einki, men tað stóð nógv á mær. Men tað var nóg mikið at gera við fyirfallandi arbeiði

Men tá fór eg við Henry Freeman hjá Jógvan Elias Thomsen úr Sandavági. Skipari var Sámal Hans Hansen úr Norðragøtu. Hann hevði nógvar ungar dreingir úr Gøtu við. Kona Sámal Hans, Marsanna, var úr Tjørnuvík, og hann hevði fleiri tjørnuvíkingar við. Ein av teimum var Johan Simonsen, sum giftist til Klaksvíkar, og sum seinni gjørdist løgtingsmaður fyri tjóðveldisflokkin. Hetta var hann í tilsamans 16 ár. Eg minnist Johan sum ein sera gløggan mann. Johan giftist við Helenu, sum ikki er minni gløgg. Henni eri eg eitt sindur í ætt við. Langabbi hennara Fuglfjarða Jógvan á Trøllanesi var oldurabbabeiggi mín. Helena er júst blivin 90 ár. Helena hevði verið arbeiðsgenta í Gøtu. Her var hon komin at kenna Tór Thomsen, sum hon helt saman við seinnu árini.

Petur Oluf, systkinabarnið, og eg høvdu koyggju saman. Vit vóru so smáir, at vit væl rúmaðust í somu koyggju.

Hetta at fara til skips so ungur var ótrúliga hart. Ein avbjóðing var í sær sjálvum at gera sær reiðskapin. Men reiðskapur hevði altíð verið í húsinum, so tað var ikki trupulleiki hjá mær, um eg misti ein húk.

Sum aðrir av manningini hevði eg keypt mær tubakk til túrin. Táið eg fyrst á túrinum rullaði mær eina sigarett kemur Sámal og sigur við meg: »So leingi tú er við her, sleppur tú ikki at roykja.« Og soleiðis bleiv. Men so roykti eg heima í staðin.

Sigast kann um Sámal, at hann var góður við teir ungu. Sámal var systkinabarn Petur Oluf systkinabarnið. Pápar teirra vóru beiggjar.

Eg var við Sámali í hesum umfarinum í 1933-1935. Eg skuldi eisini fara í 1936, men tá gjørdist eg sjúkur og slapp ongan veg.

Eg havi ikki verið við deyðsigl-ara. Vit nýttu segl men høvdu eisini motor til hjálpar, sum var tað vanliga tá á døgum. Tá tað var so frægt lot, at skipið kom fram við seglum, so bleiv motorurin steðgaður.

Eg var tískil eisini undir Íslandi, tá ið Nólsoy og Neptun gingu burtur í 1934, sum nógv hevur verið skrivað um í Miðvikuni. Tað var eitt grúligt illveður ið var.

Í 1935 hevði eg blindtarms-bruna umborð, men tað javnaði seg, sum tað ikki altíð ger. Eg lá bara til pínan var av, havi kanska fingið okkurt doyvandi eisini. Tann túrin høvdu vit eisini samanstoyt við ein trolara, men tíbetur hendi einki.

## Meslingagrindin

Í december 1935 var tann víð-gitna meslingagrindin í Gøtu, sum førdi til, at meslingar fóru at ganga víða um í landinum. Nógv fólk doyði bæði í Gøtu og aðra staðni.

Eg var ein av teimum fyrstu, sum legðist saman við Óla Jákup á Túvu. Hann kláraði tað ikki. Eg kom so yvir tað, men tað var ræðuliga stríggið.

Men foreldrini høvdu havt meslingar. Í 1916 gingu eisini meslingar, og tá høvdu pápa-beiggjarnir Johan Elias og Johan Pauli havt teir.

Tað sama gjørdi beiggi mín Óli, men hann doyðu av eftirsjúku.

Høgni svágur mín giftur við Eriku hevði heldur ikki havt meslingar. Mamma hansara doyði annars av meslingum í 1916.

Hetta var so ógvuliga syrgiligt. Mammubeiggi Høgna, Tummas í Funningsfirði, hevði verið til skips. Meslingar gingu, og hann varð koyrdur í karantenu, tá ið skipið kom heim. Tá hildið var, at nú var sloppið, slapp hann til hús.

Mamma Høgna, Anna Sofía á Kletti, og Anna Louisa í Jákupsstovu, sum seinni gjørdist vermamma mín, avráða, at tær skulu fara norður í Funningsfjørð at ynskja beiggjanum og svág-inum væl aftur komnan. Men tað, sum tær ikki vistu, var, at Tummas var útbrotin av meslingum á veg til hús. Tá ið tær eftir henda langa gongutúrin koma fram og síggja, hvussu vorðið var, kúvenda tær aftur til Norðagøtu. Har var einki at gera. Tær máttu í karantenu. Men so halda tær eisini, at tær eiga nú ikki at vera saman í karantenu, um nú bert onnur var smittað. So verður gjørt. Tað vísir seg, at bert Anna Sofía er smittað og verður sjúk. Tá tordi eingin at koma húsinum nær. Tey bóru henni mat, og settu hann á ein stein uttanfyri. Tískil endaði tað við, at hon doyði uttan at koma sínum nær aftur frá tí, hon hendan morgunin fór hesa vanlukkuferð.

Eftir sótu fimm børn. Tey flestu fóru í onnur hús at vera. Høgni fór til Syðrugøtu, og her koma hann eisini at búgva restina av lívinum. Tummas sjálvur doyði tveir dagar eftir heimkomuna.

Høgni fekk so meslingar í 1935 og varð nokk so ringur.

Suffía hjá Jóan Eliasi var eisini ring. Tey høvdu onga vón um hana, men hon kom kortini væl fyri seg aftur. Meslingar gingu jú so sjáldan, og tá teir so komu vóru teir so ógvusligir hjá vaksnum fólki.



*Johan Elias, Anna Malena og Jóan Pauli vóru pápasystkin Sofus*